# Vælkomin á ólavsøku

*Vælkomin til Havnar, kennið tykkum nú sum heima!*

Aftur hesa ólavsøkuna er tað okkum í høvuðsstaðnum ein stór gleði at kunna bjóða øllum okkara mongu gestum vælkomin til Havnar. Hesar dagarnar vilja vit sýna okkara gestablídni og lata dyrnar upp á víðan vegg, so øll skulu kenna seg væl í Havnini – eisini á ólavsøku.

Ólavsøkan er við sínum mongu innan- og uttanduratiltøkum landsins størsta fólkaveitsla, sum aftur hesa ferð endar á Vaglinum ólavsøkukvøld, har føroyingar í túsunda tali lata rødd sína brúsa í góða samklanginum og soleiðis røkja henda týðandi part av mentanararvi okkara, sum felagssangurin er.

Eisini í ár verður roynt at fáa eina so góða og lokkandi skrá setta saman sum gjørligt, so at okkurt skal vera til øll. Helst er tað heldur ikki ov nógv gjørt av, um sagt verður, at hesa ferð verður gjørt uppaftur meira burturúr, so bæði vit og allir ólavsøkugestirnir fáa eina góða uppliving.

Tað er upp til okkum politikarar at skapa karmarnar, so virksemi av ymsum slagi fær verið. Tíbetur hava vit eisini hópin av sonnum eldsálum, sum bæði í ítrótti, mentan, samkomulívi og øðrum høpi gera sítt allarbesta fyri at fylla karmarnar út, so tilboðini eru bæði mong og góð.

Samstundis kunnu vit fegnast um, at tað grør um gangandi fót í Havnini. Vágsbotnur er perlan við café, sølutorgi og tónleiki, og so hava vit eisini fingið Reinsaríið sum spælistað. Harafturat verða bæði tónleikur, sangur, dansur og annað undirhald á stórum palli í Gamla Kommunuskúlagarðinum.

Ynski mítt fyri hesa ólavsøkuna skal vera, at vit fáa nakrar góðveðursløtur í Havnargøtum og býnum annars, so allir føroyingar kunnu njóta sín høvuðsstað í hugnaligari samveru við familju, vinum og kenningum. Á ólavsøku skulu vit leggja gerandisdagin til viks og bara njóta og hava tað gott.

Í høvuðsstaðnum eru vit til reiðar at taka ímóti mongu ólavsøkugestunum, bæði av bygd og bý, og skal tað vera mín vón, at vit aftur í ár fáa eina góða og hugnaliga tjóðarhátíð. Tað er mær ein heiður og gleði at bjóða tykkum øllum vælkomin til Havnar, og kennið tykkum nú sum heima!

*Heðin Mortensen, borgarstjóri*



Mynd: Jens Kristian Vang


